Almannamálaráðið

Løgtingið

Dagfesting: 13. august 2020
Mál nr.: 20/00687
Málsviðgjørt: JAK
Eftirkannað: 11. august 2020

Løgtingsmál nr. /2020: Uppskot til løgtingslóg um lønaríkoyti til starvsfólk og stuðul til sjálvstøðug vinnurekandi, 67 ár ella eldri, sum eru heimsend ella hava inntøkumiss orsakað av COVID-19

Uppskot til

Løgtingslóg
um
lønaríkoyti til starvsfólk og stuðul til sjálvstøðug vinnurekandi, 67 ár ella eldri, sum eru heimsend ella hava inntøkumiss orsakað av COVID-19

Virkisøki

§ 1. Løgtingslógin er galdandi fyri:
1) arbeiðsgevara á privata arbeiðsmarknaðinum, sum sendir starvsfólk, 67 ár ella eldri, heim orsakað av COVID-19,
2) starvsfólk, 67 ár ella eldri, sum verður sent heim av privatum arbeiðsgevara orsakað av COVID-19, og
3) sjálvstøðugan vinnurekandi, sum ikki fær rikið sítt virksemi til fulnar vegna avleiðingar av teimum átøkum, sum eru sett í verk fyri at basa breiðing av COVID-19.

Rætturin til lønaríkoyti

§ 2. Persónur við bústaði í Føroyum, sum hevur fylt 67 ár, og sum er í starvi hjá arbeiðsgevara á privata arbeiðsmarknaðinum, hevur rætt til lønaríkoyti frá tí degi, at viðkomandi er heimsendur av arbeiðsgevara vegna avleiðingar av teimum átøkum, sum eru sett í verk fyri at basa breiðing av COVID-19 kring heimin, og harvið ikki kann uppfylla sína starvsskyldu fult ella partvíst.
Stk. 2. Rætturin til lønaríkoyti er treytaður av, at starvsfólkið framhaldandi er í starvi hjá arbeiðsgevaranum, hóast starvsskyldan heldur uppat heilt ella partvíst.

Umsókn o.a.

§ 3. Fyri at starvsfólkið skal koma undir hesa skipan, skal arbeiðsgevarin fylla út og senda Arbeiðsloysisskipanini eitt av Arbeiðsloysisskipanini tilevnað umsóknarblað soleiðis, at tað er Arbeiðsloysisskipanini í hendi í seinasta lagi 7 dagar eftir, at arbeiðsgevarin hevur sent starvsfólkið heim.

Stk. 2. Starvsfólkið hevur skyldu at fara til arbeiðis eftir tørvi og boðum arbeiðsgevarans. Arbeiðsgevarin boðar Arbeiðsloysisskipanini frá broytingum í arbeiðsskylduni hjá starvsfólkinum.
Stk. 3. Arbeiðsloysisskipanin kann krevja, at starvsfólkið við sínari undirskrift váttar, at upplýsingarnar, sum eru í umsóknarblaðnum, eru rættar.
Stk. 4. Í serligum førum kann Arbeiðsloysisskipanin víkja frá freistini í stk. 1.

Avgreiðsla og útgjald

§ 4. Lønarískoytið er 57,69 krónur um tíman í mesta lagi 40 tímar um vikuna. Ískoytið verður veitt í sama lutfalli, sum arbeiðsskyldan minkar. Ískoytið kann tó ikki verða hægri enn tann vikuløn, persónurin í miðal hevði rætt til í tíðarskeiðinum frá 1. januar 2020 til 1. juli 2020 sambært tágaldandi starvsavtalu við arbeiðsgevara.
Stk. 2. Ískoytið til lønina verður útgoldið eftir hvørt útgjaldsskeið, ásett av Arbeiðsloysisskipanini.
Stk. 3. Ískoytið til lønina verður, eftir vanligu reglunum í skattalógini um útgjald av A-inntøkum, ávíst starvsfólkinum eftir hvørt útgjaldsskeið, við tí freist, Arbeiðsloysisskipanin hevur fyri neyðini til at avgreiða útgjaldið.

Onnur inntøka

§ 5. Allar A-inntøkur skulu upplýsast fyri Arbeiðsloysisskipanini.
Stk. 2. Lønarískoytið fyri eitt útgjaldsskeið kann verða skert, um samlaða upphæddin av lønarískoyti og A-inntøkum, sum starvsfólk hevur vunnið rætt til frá arbeiðsgevara, sum ikki er arbeiðsgevarin sambært § 2 í hesi løgtingslóg, fer upp um 17.000 krónur um mánaðin.
Stk. 3. Fyri hvørja krónu, sum samlaða upphæddin sambært stk. 2 fer upp um 17.000 krónur um mánaðin, verður lønarískoytið skert við 50 oyrum.
Stk. 4. Fyri hvørja krónu, sum samlaða upphæddin sambært stk. 2 fer upp um 27.000 krónur um mánaðin, verður lønarískoytið skert við einari krónu.
Stk. 5. Tá samlaða A-inntøkan frá arbeiðsgevara, sum ikki er arbeiðsgevarin sambært § 2 í hesi løgtingslóg, fer upp um 22.000 krónur um mánaðin, dettur rætturin til lønarískoyti burtur.
Stk. 6. Hevur ella fær starvsfólkið rætt til sjúkradagpening undir sjúku, skal viðkomandi alt fyri eitt boða Arbeiðsloysisskipanini frá hesum. Lønarískoytið verður skert við sjúkradagpeninginum.

Stuðul til sjálvstøðug vinnurekandi

§ 6. Persónur við bústaði í Føroyum, sum hevur fylt 67 ár, hevur rætt at tekna sjálvbodna trygging sum sjálvstøðugur vinnurekandi, og harvið rætt til stuðul eftir hesi løgtingslóg, tá:
1) viðkomandi hevur inntøku frá persónligum arbeiði sum sjálvstøðugur vinnurekandi, og
2) viðkomandi ikki fær rikið sítt virksemi til fulnar vegna tey átøk, sum eru sett í verk fyri at basa breiðing av COVID-19.

§ 7. Fyri at koma undir hesa trygging skal tann sjálvstøðugi vinnurekandi fylla út og senda Arbeiðsloysisskipanini eitt av Arbeiðsloysisskipanini tilevnað umsóknarblað soleiðis, at tað er Arbeiðsloysisskipanini í hendi í seinasta lagi 14 dagar eftir, at tann sjálvstøðugi vinnurekandi ikki fær rikið sítt virksemi vegna avleiðingarnar av teimum átøkum, sum eru sett í verk fyri at basa breiðing av COVID-19.
Stk. 2. Í sambandi við umsóknina skal tann vinnurekandi vátta at lúka treytirnar í § 6 í hesi løgtingslóg og § 2 í kunngerð um arbeiðsloysistrygging fyri sjálvstøðug vinnurekandi. Arbeiðsloysisskipanin kann krevja prógv fyri hesum.

Stk. 3. Tryggingin kann í fyrsta lagi fáa gildi frá tí degi, Arbeiðsloysisskipanin hevur fingið skrivliga umsókn.
Stk. 4. Arbeiðsloysisskipanin kann í serligum førum víkja frá freistini, ásett í stk. 1, og gildiskomuni, ásett í stk. 3.

§ 8. Gjaldið fyri tryggingina er 3.000 krónur.
Stk. 2. Gjaldið verður rindað Arbeiðsloysisskipanini, samstundis sum tryggingin verður teknað.
Stk. 3. Stk. 2 fevnir ikki um sjálvstøðugan vinnurekandi, sum hevur teknað trygging og goldið sambært tágaldandi løgtingslóg nr. 44 frá 7. apríl 2020, sum broytt við løgtingslóg nr. 102 frá 25. juni 2020, sbr. eisini § 10, stk. 2.

§ 9. Stuðul sambært hesi løgtingslóg er 57,69 krónur um tíman fyri í mesta lagi 40 tímar um vikuna. Stuðul verður veittur í sama lutfalli, sum virksemið minkar. Stuðulin kann tó ikki vera hægri enn tann skattskylduga inntøkan, tann sjálvstøðugi vinnurekandi hevur vunnið rætt til í miðal hvørja viku seinasta 12 mánaða tíðarskeiðið fyri 1. juli 2020. Skattskylduga inntøkan fevnir ikki um sosialar pensjónir og arbeiðsmarknaðareftirløn, sbr. § 20, stk. 1, nr. 1 og 2 í løgtingslóg um almannapensjónir o.a.
Stk. 2. Sjálvstøðugur vinnurekandi, sum bæði hevur rætt til stuðul eftir hesi grein og til ískoyti eftir § 4, hevur tilsamans einans rætt til 57,69 krónur um tíman í mesta lagi 40 tímar um vikuna.
Stk. 3. Stuðulin sambært hesi løgtingslóg verður skerdur við inntøkum, sum tann sjálvstøðugi vinnurekandi vinnur sær rætt til, eftir at hann hevur fingið rætt til stuðul. Tað áliggur tryggingartakaranum at boða Arbeiðsloysisskipanini frá aðrari inntøku, tá rætturin til slíka inntøku er vunnin.
Stk. 4. Aðrar inntøkur sambært stk. 3 verða umroknaðar til tímar, í hesi løgtingslóg nevndir arbeiðstímar, sum stuðul ikki verður goldin fyri. Arbeiðstímarnir verða roknaðir sum vunna inntøkan í útgjaldsskeiðinum, býtt við 132,69.
Stk. 5. Um tíðarskeiðið, tann sjálvstøðugi vinnurekandi hevur arbeitt í einum stuðulstíðarskeiði, er longri enn talið av arbeiðstímum, sum verða roknaðir sambært stk. 4, verður stuðul tó ikki goldin fyri hetta tíðarskeið.

§ 10. Trygging hjá sjálvstøðugum vinnurekandi, sum er 67 ár ella eldri, er galdandi so leingi, henda løgtingslóg er galdandi, men í mesta lagi eitt ár frá tí degi, tryggingin er teknað.
Stk. 2. Tryggingin hjá sjálvstøðugum vinnurekandi, sum hevur teknað trygging og goldið sambært tágaldandi løgtingslóg nr. 44 frá 7. apríl 2020, sum broytt við løgtingslóg nr. 102 frá 25. juni 2020, er galdandi so leingi, henda løgtingslóg er í gildi, tó í mesta lagi eitt ár frá tí degi, at tryggingin varð teknað sambært tágaldandi løgtingslóg.

§ 11. Tann tryggjaði hevur skyldu at boða Arbeiðsloysisskipanini frá øllum broytingum í viðurskiftum, sum kunnu ávirka tryggingarviðurskiftini.

Umsiting og eftirlit

§ 12. Til umsiting og eftirlit við rindan av lønaríkoyti og stuðli sambært hesi løgtingslóg kann Arbeiðsloysisskipanin útvega sær allar viðkomandi upplýsingar frá TAKS og øðrum myndugleikum.
Stk. 2. Fakfeløg og arbeiðsgevarar hava skyldu til at geva Arbeiðsloysisskipanini tær upplýsingar, skipanin biður um í sambandi við umsiting og eftirlit.

Afturgjald

§ 13. Upphæddir, sum eru útgoldnar av órøttum, kunnu verða kravdar afturgoldnar sambært § 28 í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing.

Revsing

§ 14. Um ikki strangari revsing er ásett sambært lóggávu annars, verður hann revsaður við sekt, sum sambært hesi løgtingslóg gevur skipanini skeivar ella misvísandi upplýsingar.
Stk. 2. Feløg og aðrir løgfrøðiligir persónar koma undir revsiábyrgd eftir reglunum í kapitli 5 í revsilógini.

Kærur

§ 15. Avgerðir, sum Arbeiðsloysisskipanin hevur tikið sambært hesi løgtingslóg, kunnu kærast til kærunevndina hjá Arbeiðsloysisskipanini sambært § 26 í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing.

Útreiðslur

§ 16. Samlaðu útreiðslurnar fyri lønaríkoyti, stuðul og umsiting sambært hesi løgtingslóg verða endurrindaðar Arbeiðsloysisskipanini av landinum.

Gildiskoma

§ 17. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og hevur virknað frá 1. juli 2020 og fer úr gildi 31. august 2020.
Stk. 2. Umsóknir sbrt. hesi løgtingslóg, sum eru fyri tíðarskeiðið frá 1. juli 2020 til og við 31. august 2020, men sum ikki eru Arbeiðsloysisskipanini í hendi ella ikki eru liðugt viðgjørdar, áðrenn løgtingslógin fer úr gildi, verða viðgjørdar sambært reglunum í hesi løgtingslóg. Umsóknin skal vera Arbeiðsloysisskipanini í hendi innan 3 mánaðir eftir, at lógin er farin úr gildi.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Løgtingslóg nr. 44 frá 7. apríl 2020, sum broytt við løgtingslóg nr. 102 frá 25. juni 2020, ið var partur av hjálparpakkunum hjá landsstýrinum fyrr í ár, fór við sólsetursáseting úr gildi hin 30. juni 2020.

Arbeiðandi fólkapensjonistar, heimsendir av arbeiðsgevara á privata arbeiðsmarknaðinum orsakað av COVID-19, hava eftir hetta ikki havt rætt til lønaríkoyti. Á sama hátt hava sjálvstøðugir vinnurekandi fólkapensjonistar ikki havt rætt til stuðul fyri inntøkumiss orsakað av COVID-19.

Tá løgtingslógin fór úr gildi, varð mett, at tørvur ikki var á serligu skipanunum longur.

Síðani mánaðarskiftið juli/august hevur smittan tó av álvara tikið seg upp aftur, og í løtuni eru uml. hundrað persónar smittaðir og knappliga 1000 persónar í sóttarhaldi. Tað er ikki óhugsandi, at hetta talið fer at vaksa komandi tíðina, og tí er ætlanin at seta í verk aftur skipanirnar við lønaríkoyti til arbeiðandi fólkapensjonistar, ið eru heimsendir av arbeiðsgevara á privata arbeiðsmarknaðinum orsakað av COVID-19, og trygging til sjálvstøðugar vinnurekandi fólkapensjonistar, ið hava inntøkumiss orsakað av COVID-19.

1.2. Galdandi lóggáva

Eftir at løgtingslóg nr. 44 frá 7. apríl 2020, sum broytt við løgtingslóg nr. 102 frá 25. juni 2020, er farin úr gildi, hava arbeiðandi fólkapensjonistar ikki longur rætt til lønaríkoyti ella sum sjálvstøðug vinnurekandi at tekna trygging móti inntøkumissi.

Fólkapensjonistar eru ikki fevndir av vanligu arbeiðsmarknaðarskipanunum. Tá ein fólkapensjonistur á arbeiðsmarknaðinum missir sítt starv ella verður sjúkur, so fær hann ikki nakað endurgjald fyri mistu inntøkuna. Hann rindar ikki als-gjald og er ikki tryggjaður í ALS ella í sjúkradagpengaskipanini hjá Almannaverkinum. Fólkapensjónin er at meta sum kompensatión fyri ikki longur at vera á arbeiðsmarknaðinum og skal tryggja fólki støðuga inntøku á ellisárum. Hetta er eisini orsøkin til, at fólkapensjonistar ikki eru fevndir av vanligu arbeiðsmarknaðarskipanunum.

Fyri at lýsa málið er niðanfyri ein lýsing av fíggjarligu viðurskiftunum hjá pensjonistum, tá arbeiðsinntøka fellur burtur.

Skilt verður ímillum *gamla pensjón* og *nýggja pensjón*. Pensjónsnýskipanin kom í gildi 1. januar 2020 og er galdandi fyri nýggjar pensjonistar. Hetta verður kallað nýggj pensjón. Tey, sum vóru pensjonistar áðrenn 1. januar 2020, fáa gamla pensjón.

Tað eru gott 8300 fólkapensjonistar, harav tey uml. 8200 fáa gamla pensjón. Hesi fáa, uttan mun til inntøku annars, altíð útgjald frá Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum (AMEG) og grundupphæddina í fólkapensjónini. Tey, sum arbeiða og hava inntøkur kunnu missa viðbótina ella part av viðbótini. Viðbótin er uml. 25-30% av samlaðu pensjónini (AMEG + fólkapensjón).

Hjá teimum, sum fáa nýggja pensjón, verður mótroknað í bæði grundupphædd og viðbót. Mótroknað verður fyrst í grundupphæddini og síðani viðbótini. Enn eru bert uml. 100 persónar, sum fáa nýggja pensjón, og av teimum eru 13, sum hava somikið høga inntøku, at grundupphæddin er fult mótroknað, og móttaka tey sostatt einans lutvísa viðbót (umframt útgjald frá AMEG).

Fólkapensjonistar, sum arbeiða, móttaka útgjald frá AMEG og lutvísa fólkapensjón og gjalda ikki arbeiðsmarknaðargjøld (barsilsskipan, ALS og til AMEG). Sostatt eru fíggjarligu treytirnar hjá fólkapensjonistum, sum arbeiða, munandi betri enn hjá løntakarum, sum ikki eru pensjonistar. Men um arbeiðsinntøkan dettur burtur í eitt fyribils tíðarskeið vegna arbeiðsloysi ella sjúku, so er løntakarin tryggjaður umvegis ALS ella dagpeningaskipanina hjá Almannaverkinum. Fólkapensjonisturin hevur ikki rætt til hesar veitingarnar, júst tí hann fær fólkapensjón.

Talvurnar niðanfyri vísa, hvussu inntøkan aftaná skatt og øll tvungin gjøld broytast, um ein persónur er fyri inntøkumissi í ein mánað vegna sjúku. Løntakarin í talvunum fær útgjald frá ALS, tá inntøkan dettur burtur, meðan fólkapensjonisturin missir arbeiðsinntøkuna og hevur pensjónina eftir.

Gomul pensjón

	Løntakari - ikki fólkap.		Ógiftur fólkap.		Giftur fólkap. (1)	
Arbeiðsinntøka um árið	Í arbeiði Inntøka eftir skatt og gjøld um mdr	Tá arb. innt. dettur burtur í ein mdr.	Í arbeiði Inntøka eftir skatt og gjøld um mdr.	Tá arb. innt. dettur burtur í ein mdr.	Í arbeiði Inntøka eftir skatt og gjøld um mdr.	Tá arb. innt. dettur burtur í ein mdr.
0			11.900	11.900	10.300	10.300
100.000	5.900	4.700	16.000	10.150	14.700	8.800
200.000	10.800	8.350	20.050	9.000	18.750	8.500
300.000	15.400	11.300	24.075	8.000	23.200	8.000
400.000	19.600	11.300	28.550	8.000	27.925	8.000

(1) Dømið er pensjonistur uttan mótrokning millum hjúnafelagar. Hevði dømið verið við mótrokning, og hjúnafelagin ikki hevur inntøku, eru upphæddirnar nakrar 100 kr. hægri.
Hjá pensjonistum er hædd ikki tikin fyri møguligum útgjaldi frá privatari pensjón ella tvungnari uppsparing
Fyrivarni skal takast fyri upphæddum eftir skatt, tí skattaviðurskiftini hjá fólki eru ymisk.

Nýggj pensjón

	Løntakari - ikki fólkap.		Ógiftur fólkap.		Giftur fólkap.	
Arbeiðsinntøka um árið	Inntøka eftir skatt og gjøld	Tá arb. innt. dettur burtur í ein mdr.	Tøk innt. um mdr	Tá arb. innt. dettur burtur í ein mdr	Tøk innt. um mdr	Tá arb. innt. dettur burtur í ein mdr
0			11.900	11.900	10.300	10.300
100.000	5.900	4.700	16.300	10.600	14.700	8.900
200.000	10.800	8.350	19.600	8.500	18.000	8.500
300.000	15.400	11.300	22.500	6.900	21.300	5.000
400.000	19.600	11.300	25.850	4.700	24.700	4.000

Hjá pensjonistum er hædd ikki tikin fyri møguligum útgjaldi frá privatari pensjón ella tvungnari uppsparing
Fyrivarni skal takast fyri upphæddum eftir skatt, tí skattaviðurskiftini hjá fólki eru ymisk.

Talvurnar omanfyri vísa sum nevnt, hvussu tøka inntøkan broytist, tá persónur við støðugari arbeiðsinntøku missir arbeiðsinntøkuna í ein mánað. Dettur inntøkan burtur í meira enn ein mánað, hækkar tøka inntøkan nakað, tí at lutfalsliga upphæddin, sum verður rindað í skatti, lækkar. Í talvunum omanfyri er hædd ikki tikin fyri, at ein pensjonistur, sum missir sína arbeiðsinntøku, fær rætt til hægri fólkapensjón. Hetta hendir tó ikki sjálvvirkandi beinanvegin uttan so, at pensjonisturin fyri Almannaverkinum ger vart við, at pensjónin skal ásetast av nýggjum. Tá árið er farið afturum, verða pensjónir eftirroknaðar, og ein fólkapensjonistur fær afturgoldið upphæddina, sum hann hevur fingið ov lítið í pensjón.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við lógaruppskotinum er at seta í gildi aftur somu reglur, sum ásettar vórðu við løgtingslóg nr. 44 frá 7. apríl 2020, sum broytt við løgtingslóg nr. 102 frá 25. juni 2020, sum fór úr gildi 30. juni 2020, soleiðis, at arbeiðandi fólkapensjonistar aftur fáa rætt til lønarískoyti, um teir verða heimsendir av arbeiðsgevara á privata arbeiðsmarknaðinum orsakað av COVID-19, og sjálvstøðugir vinnurekandi fólkapensjonistar, sum hava inntøkumiss orsakað av COVID-19, aftur fáa rætt at tekna trygging móti inntøkumissi.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Við lógaruppskotinum fáa fólkapensjonistar, sum eru heimsendir av arbeiðsgevara á privata arbeiðsmarknaðinum, rætt til eitt lønarískoyti, sum er helvtin (57,69 kr. um tíman) av tí, sum løntakarar undir 67 ár (115,38 kr. um tíman) hava rætt til. Orsøkin til, at fólkapensjonistar bara fáa helvtina av lønarískoytinum, er, at fólkapensjonistar hava fólkapensjónina aftrat arbeiðsinntøkuni.

Harafturat fáa sjálvstøðugir vinnurekandi fólkapensjonistar rætt at tekna ein trygging móti inntøkumissi orsakað av COVID-19. Stuðulin til sjálvstøðugar vinnurekandi fólkapensjonistar er helvtin (57,69 kr. um tíman) av tí, sum ein sjálvstøðugur vinnurekandi undir 67 ár hevur rætt til (115,69 kr. um tíman). Orsøkin er sum nevnt, at fólkapensjonistar hava fólkapensjónina aftrat inntøkuni frá tí sjálvstøðuga vinnuvirkseminum.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið er partur av hjálparpakkanum hjá landsstýrinum til føroyska arbeiðsmarknaðin í sambandi við COVID-19. Málið hevur tí skund, og tað hevur ikki verið gjørligt at sent tað til ummælis.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Henda løgtingslóg verður eftir ætlan umsitin av ALS, men samlaðu útreiðslurnar, sum standast av henni, verða endurrindaðar Arbeiðsloysisskipanini av landinum. Uppskotið hevur sostatt fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur. Fyri landið er talan um beinleiðis útreiðslur í sambandi við endurrindan av lønarískoyti og til umsiting. Uppskotið tryggjar, at skattainntøkurnar hjá landi og kommunum í ein ávísan mun verða varðveittar, hóast virksemið í samfelagnum minkar munandi.

Tað ber ikki til at siga, hvussu COVID-19 ávirkar arbeiðsmarknaðin, og hvussu nógvir fólkapensjonistar, sum arbeiða í privata geiranum, fara at verða sendir heim ella fara at arbeiða minni. Sostatt ber heldur ikki til at meta neyvt um fíggjarligar avleiðingar fyri landskassan.

Ein fólkapensjonistur, sum fær lønarískoyti á 57,69 kr. um tíman í ein mánað, fær uml. 9.000-10.000 kr. um mánaðin. Við støði í stakroynd av 1/3 av øllum fólkapensjonistum verður leysliga mett, at umleið 800 pensjonistar, sum hava arbeiðsinntøku hægri enn 10.000 kr. um mánaðin, arbeiða hjá privatum arbeiðsgevara. Um so er, at t.d. 300 pensjonistar fara at fáa lønarískoyti í 3 mánaðir, verður útreiðslan uml. 9 mió. kr.

Tíðarskeiðið 12. mars 2020 til 30. juni 2020, tá alt samfelagið varð sett niður í ferð, var kostnaðurin fyri skipanina áleið 2 mió. kr.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur ikki við sær umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur. Uppskotið er orðað soleiðis, at umsitingin verður í samsvari við galdandi arbeiðsloysisskipan, so verandi mannagongdir skulu ikki broytast.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur jaligar avleiðingar fyri vinnuna. Privatar fyritøkur, sum hava fólkapensjonistar í starvi verða betur førar fyri at varðveita tilknýtið til hesa arbeiðsmegina.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur við sær jaligar avleiðingar fyri fólkapensjonistar, sum arbeiða í privatu vinnuni, tí hesir fáa rætt til lønarískoyti, um teir verða sendir heim ella arbeiða minni orsakað av COVID-19.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Lógaruppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar á økinum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Lógaruppskotið hevur ikki við sær kendar avleiðingar fyri skyldur Føroya sambært Hoyvíkssáttmálanum, EMRS og Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

2.9. Markaforðingar
Lógaruppskotið hevur ikki við sær kendar markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Brot á ásetingarnar í lógaruppskotinum kunnu verða revsað við sekt.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um skattir ella avgjøld.

2.12. Gjøld
Fyri at koma undir tryggingina til sjálvstøðugar vinnurekandi fólkapensjonistar skal rindast eitt gjald upp á 3 tús. kr.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Ger arbeiðsgevarin av at søkja um lønaríkoyti til starvsfólk, er neyðugt at arbeiðsgevarin fyllir út og sendir inn eitt umsóknarblað. Arbeiðsgevarin skal boða Arbeiðsloysisskipanini frá broytingum í arbeiðsskylduni hjá starvsfólkinum, meðan starvsfólkið er í stuðulsskipanini.

Harafturat hava persónar, ið fáa lønaríkoyti ella stuðul, skyldu at boða Arbeiðsloysisskipanini frá øðrum A-inntøkum og viðurskiftum yvirhøvur, sum kunnu hava týdning fyri rættin til lønaríkoyti ella stuðul.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, stovn undir landsstýrismanninum ella til kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar kendar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Ja	Nei	Ja	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Ja	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Greinin ásetir persónskaran, sum lógin fevnir um.

Sambært § 1 er løgtingslógin galdandi fyri:

1) Arbeiðsgevarar á privata arbeiðsmarknaðinum, ið senda starvsfólk, sum eru 67 ár ella eldri – t.e. fólkapensjonistar – heim orsakað av støðuni við COVID-19, og
2) starvsfólk, 67 ár ella eldri, ið verða send heim, og
3) sjálvstøðugan vinnurekandi, sum ikki fær rikið sítt virksemi til fulnar vegna avleiðingar av teimum átøkum, sum eru sett í verk fyri at basa breiðing av COVID-19.

Greinin skal skiljast og umsitast á sama hátt sum § 1 í kunngerð nr. 26 frá 23. mars 2020 um útgjald til persónar, sum eru í starvi hjá arbeiðsgevara á privata arbeiðsmarknaðinum, sum eru heimsendir av arbeiðsgevara orsakað av COVID-19.

Til § 2
§ 2 ásetir treytirnar fyri at kunna fáa lønaríkoyti.

Sambært § 2, stk. 1 er tað ein treyt, at persónurin er búsitandi í Føroyum, at persónurin hevur fylt 67 ár – og harvið lýkur aldurstreytina fyri fólkapensjón – og at persónurin er í starvi hjá arbeiðsgevara á privata arbeiðsmarknaðinum. Harafturat er tað ein treyt, at persónurin er heimsendur av arbeiðsgevaranum vegna tiltøk, ið eru sett í verk fyri at basa breiðan av COVID-19, og at viðkomandi tískil annaðhvørt heilt ella lutvíst ikki kann røkja sínar starvsskyldur.

Sambært stk. 2 er rætturin til lønaríkoyti treytaður av, at starvsfólkið framhaldandi er í starvi hjá arbeiðsgevaranum, hóast starvsskyldan heldur uppat heilt ella partvíst.

Ásetingin inniber eina nýggja tíðaravmarkaða stuðulsskipan til fólkapensjónistar, sum eru í starvi á privata arbeiðsmarknaðinum, og sum av arbeiðsgevaranum verða heimsend ella sett niður í tíð vegna avleiðingar av teimum átøkum, sum eru sett í verk fyri at basa spjaðingini av COVID-19. Harafturat er stuðulin treytaður av, at viðkomandi hevur bústað í Føroyum.

Talan kann í útgangsstøðinum vera um allar privatar arbeiðsgevarar, sum kunnu seta starvsfólk niður í tíð heilt ella partvíst, um grundgevingin er, at tørvurin á arbeiðsmegi er minkaður orsakað av tiltøkunum, sum eru sett í verk fyri at basa spjaðingini av COVID-19. Sum dømi kann nevnast, at fólk, sum kunnu útseta at fara til tannlækna, útseta tað. Hetta hevur við sær, at tannlæknarnir fáa minni at gera og harvið eisini starvsfólkini hjá tannlæknanum. Tannlæknin kann sostatt senda starvsfólkini til hús ella niður í tíð, við ongari ella niðursettari løn, meðan stavsfólkið fær lønaríkoyti frá ALS. Talan kann vera um starvsfólk innan allar hugsandi greinar á privata arbeiðsmarknaðinum, og her verður ikki givið eitt fullfíggjað yvirlit. Stjórar eru eisini starvsfólk, ið kunnu verða heimsendir ella settir niður í tíð.

Lógaruppskotið hevur tó ikki við sær, at kollektivir sáttmálar verða settir til viks. Tað áliggur pørtunum at gera neyðugu avtalurnar, soleiðis at heimild verður fingin til vegar at senda starvsfólkið heim heilt ella partvís uttan løn.

Greinin skal skiljast og umsitast á sama hátt sum § 2 í kunngerð nr. 26 frá 23. mars 2020 um útgjald til persónar, sum eru í starvi hjá arbeiðsgevara á privata arbeiðsmarknaðinum, sum eru heimsendir av arbeiðsgevara orsakað av COVID-19.

Til § 3
Greinin ásetir mannagongdina í sambandi við umsókn um lønarískoyti.

Tað er arbeiðsgevarin, ið avgreiðir umsókn mótvegis Arbeiðsloysisskipanini innan 7 dagar eftir, at viðkomandi er sendur heim, sbr. § 3, stk. 1. Orsøkin til 7 daga freistina er at skunda undir arbeiðsgevara soleiðis, at starvsfólkini fáa lønarískoyti so skjótt sum gjørligt. Starvsfólkið hevur skyldu at fara til arbeiðis eftir tørvi og boðum frá arbeiðsgevaranum, og arbeiðsgevarin hevur skyldu at boða Arbeiðsloysisskipanini frá broytingum í starvsskylduni hjá starvsfólkinum, sbr. § 3, stk. 2.

Tá freistin í stk. 1 er farin, hevur starvsfólkið sum meginregla ikki rætt til gerast partur av skipanini, men sambært § 3, stk. 4 kann Arbeiðsloysisskipanin í serligum førum víkja frá freistini. Undantaksheimildin kann t.d. hugsast at verða nýtt í teimum førum, tá starvsfólk eru send heim aftaná 1. juli 2020, men áðrenn henda løgtingslóg er komin í gildi.

Greinin skal skiljast og umsitast á sama hátt sum § 3 í kunngerð nr. 26 frá 23. mars 2020 um útgjald til persónar, sum eru í starvi hjá arbeiðsgevara á privata arbeiðsmarknaðinum, sum eru heimsendir av arbeiðsgevara orsakað av COVID-19.

Til § 4
Sambært § 4, stk. 1 er lønarískoytið 57,69 krónur um tíman. Útrokningarhátturin hevur sum fyrimynd § 16, stk. 2 í ALS-lógini, og útrokningin verður gjørd á hendan hátt: kr. 120.000 (10.000 kr. x 12 mdr.) býtt við 2.080 tímum um árið. Vanligur arbeiðsloysisstuðul er 103,75 kr. um tíman. Tann upphæddin verður roknað á henda hátt: 210.000 kr. (hægsti árligi arbeiðsloysisstuðul) býtt við 253 (útgjaldsdagar) býtt við 8 (tímar fyri hvønn dag). Vanligur arbeiðsloysisstuðul er 17.500 kr. um mánaðin (210.000 kr./ 12 mdr.).

Lønarískoytið tekur útgangsstøði í 10.000 kr., sum er helvtin av mánaðarliga lønarískoytinum sambært COVID-19 stuðulsskipanini í ALS-lógini. Verður arbeiðstíðin skerd 100%, verður lønarískoytið 100% av í miðal 10.000 kr. um mánaðin. Verður arbeiðstíðin skerd við 50%, verður lønarískoytið 50% av í miðal 10.000 kr. um mánaðin. Verður arbeiðstíðin skerd 25%, verður lønarískoytið 25% av í miðal 10.000 kr. um mánaðin o.s.fr.

Endamálið er at tryggja, at persónur ikki fær meira í lønarískoyti enn viðkomandi hevur havt í miðal vikuløn í tíðarskeiðinum frá 1. januar til 1. juli 2020 sambært tágaldandi starvsavtalu við arbeiðsgevara. Ásett er, at lønarískoytið er 57,69 kr. um tíman í mesta lagi 40 tímar um vikuna. Ískoytið verður veitt í sama lutfalli, sum starvsskyldan minkar. Ískoytið kann sostatt í mesta lagi verða 2.307,60 kr. um vikuna. Hevur miðal vikulønin hjá einum starvsfólki verið lægri enn 2.307,60 kr. í tíðarskeiðnum 1. januar 2020 til 1. juli 2020, so kann ískoyti ikki vera hægri enn miðal vikulønin. Hevur eitt starvsfólk havt eina vikuløn, sum í miðal hevur verið t.d. 2.000 kr. í tíðarskeiðnum 1. januar 2020 til 1. juli 2020, so verður lønarískoytið eisini 2.000 kr. um vikuna, um starvsbrøkurin minkar við 100%. Minkar starvsbrøkurin hjá viðkomandi við 50%, verður lønarískoytið 1.000 kr. um vikuna.

Hevur eitt starvsfólk havt eina vikuløn, sum í miðal hevur verið hægri enn 2.307,60 kr. í tíðarskeiðnum 1. januar 2020 til 1. juli 2020, verður lønarískoytið 2.307,60 kr. um vikuna, um starvsbrøkurin minkar við 100%. Minkar starvsbrøkurin hjá viðkomandi við t.d. 75%, verður lønarískoytið (2.307,60 *0,75) 1.730,70 kr. um vikuna o.s.fr.

§ 4, stk. 2-3 áseta útgjaldsskeið o.a. Eitt útgjaldsskeið fevnir um 14 álmanakkadagar og 10 útgjaldsdagar svarandi til tvær arbeiðsvikur.

Greinin skal skiljast og umsitast á sama hátt sum § 4 í kunngerð nr. 26 frá 23. mars 2020 um útgjald til persónar, sum eru í starvi hjá arbeiðsgevara á privata arbeiðsmarknaðinum, sum eru heimsendir av arbeiðsgevara orsakað av COVID-19.

Til § 5
Sambært § 5, stk. 1 skulu allar A-inntøkur upplýsast fyri Arbeiðsloysisskipanini.

Endamálið við hesum er at tryggja, at tað er møguligt at skerja lønarískoytið hjá fólkapensjonistum, sum eru sendir heim av einum arbeiðsgevara, men sum framvegis hava eina ávísa inntøku frá øðrum arbeiðsgevara.

Lønarískoytið verður ikki skert við fólkapensjónini.

Sambært § 5, stk. 2 kann lønarískoytið skerjast, um samlaða upphæddin av lønarískoyti og A-inntøkum, sum starvsfólk hevur vunnið rætt til frá arbeiðsgevara, sum ikki er arbeiðsgevarin sambært § 2 í løgtingslógini, fer upp um 17.000 krónur um mánaðin.

Sambært § 5, stk. 3 verður lønarískoytið skert við 50 oyrum fyri hvørja krónu, sum samlaða upphæddin fer upp um 17.000 kr. um mánaðin. Sambært stk. 4 verður lønarískoytið skert við einari krónu fyri hvørja krónu, sum samlaða upphæddin fer upp um 27.000 kr. um mánaðin.

Sambært § 5, stk. 5 dettur rætturin til lønarískoyti burtur, tá A-inntøkan frá arbeiðsgevara, sum ikki er arbeiðsgevarin sambært § 2 í hesi løgtingslóg, fer upp um 22.000 kr. um mánaðin.

Greinin skal skiljast og umsitast á sama hátt sum § 5 í kunngerð nr. 26 frá 23. mars 2020 um útgjald til persónar, sum eru í starvi hjá arbeiðsgevara á privata arbeiðsmarknaðinum, sum eru heimsendir av arbeiðsgevara orsakað av COVID-19, sum broytt við kunngerð nr. 51 frá 17. apríl 2020.

Til § 6
§ 6 ásetir treytirnar fyri at kunna søkja um at koma undir tryggingina fyri sjálvstøðugar vinnurekandi fólkapensjonistar.

Grundleggjandi treytirnar fyri rættinum at tekna trygging, og harvið eisini rættinum at fáa stuðul, eru, at persónurin hevur bústað í Føroyum, og at persónurin er 67 ár ella eldri.

Harafturat eru treytirnar, at persónurin hevur inntøku frá sínum arbeiði sum sjálvstøðugur vinnurekandi, sbr. § 6, nr. 1, og at viðkomandi ikki fær rikið sítt virksemi til fulnar orsakað av átøkunum, ið eru sett í verk fyri at basa breiðing av COVID-19, sbr. § 6, nr. 2.

Burtursæð frá aldurstreytini (67 ár og eldri) skal greinin skiljast og umsitast á sama hátt sum § 1 í kunngerð nr. 27 frá 23. mars 2020 um rætt til stuðul til sjálvstøðug vinnurekandi í sambandi við COVID-19.

Til § 7
§ 7 ásetir mannagongdina fyri umsókn um at koma undir tryggingina.

Sambært § 7, stk. 1 skal tann sjálvstøðugi vinnurekandi senda Arbeiðsloysisskipanini eitt umsóknarblað. Umsóknarblaðið skal sendast Arbeiðsloysisskipanini innan 14 dagar eftir, at tann sjálvstøðugi vinnurekandi ikki longur kann reka sítt virksemi vegna avleiðingarnar av teimum átøkum, ið eru sett í verk fyri at basa breiðing av COVID-19.

Sambært § 7, stk. 3 kann tryggingin í fyrsta lagi fáa gildi frá tí degi, at Arbeiðsloysisskipanin hevur fingið skrivliga umsókn

Sambært § 7, stk. 4 kann Arbeiðsloysisskipanin tó í serligum førum víkja frá freistini í stk. 1 og gildiskomuni í stk. 3. Víkjast kann eitt nú frá freistini ella gildiskomuni, tá tann sjálvstøðugi vinnurekandi varð raktur av avleiðingunum av COVID 19 áðrenn, henda løgtingslóg kom í gildi.

Greinin skal skiljast og umsitast á sama hátt sum § 2 í kunngerð nr. 27 frá 23. mars 2020 um rætt til stuðul til sjálvstøðug vinnurekandi í sambandi við COVID-19.

Til § 8
§ 8 ásetir tryggingargjaldið, ið sambært stk. 1 er 3.000 kr.

§ 8, stk. 2 ásetir, at tann sjálvstøðugi vinnurekandi skal rinda gjaldið samstundis, sum tryggingin verður teknað.

Tryggingarskeiðið er í mesta lagi eitt ár í senn, sbr. viðmerkingarnar til § 10 niðanfyri. Í sambandi við endurnýggjan av tryggingini skal tann sjálvstøðugi vinnurekandi rinda nýtt tryggingargjald.

Stk. 3 ásetir, at sjálvstøðugur vinnurekandi, sum hevur teknað trygging og goldið sambært tágaldandi løgtingslóg nr. 44 frá 7. apríl 2020, sum broytt við løgtingslóg nr. 102 frá 25. juni 2020, ikki skal gjalda umaftur, tá tryggingin verður teknað. Tryggingin hjá hesum er galdandi í eitt ár frá tí degi, at tryggingin upprunaliga varð teknað sambært áður nevndu løgtingslóg. Um løgtingslógin framvegis er í gildi, tá hetta skeiðið er runnið, skal tann sjálvstøðugi vinnurekandi endurnýggja tryggingina og rindað nýtt gjald sambært § 8, stk. 2, sbr. § 10, stk. 1.

Greinin skal skiljast og umsitast á sama hátt sum § 3 í kunngerð nr. 27 frá 23. mars 2020 um rætt til stuðul til sjálvstøðug vinnurekandi í sambandi við COVID-19.

Til § 9
§ 9 ásetir, hvussu nógv verður veitt í stuðli.

Sambært § 9, stk. 1, 1. pkt. er stuðulin 57,69 kr. um tíman fyri í mesta lagi 40 tímar um vikuna.

Sambært § 9, stk. 1, 2. pkt. verður stuðulin veittur í sama lutfalli, sum virksemið minkar. Um tann sjálvstøðugi vinnurekandi lutvíst fær rikið sítt virksemi, verður stuðul tískil bara veittur fyri tann partin av virkseminum, sum viðkomandi ikki fær rikið.

Sambært § 9, stk. 1, 3. pkt. kann stuðulin ikki vera hægri enn tann skattskylduga inntøkan, sum tann sjálvstøðugi vinnurekandi hevur vunnið rætt til í miðal hvørja viku seinasta 12 mánaða tíðarskeiðið fyri 1. juli 2020. Endamálið við hesum er at tryggja, at tann sjálvstøðugi vinnurekandi hevur havt inntøkugevandi virksemi í eitt tíðarskeið sum treyt fyri at hava rætt til stuðul.

Stuðul verður sum nevnt veittur í sama lutfalli, sum virksemið minkar, men kann í mesta lagi vera (57,69*40) 2.307,60 kr. um vikuna.

Hevur tann skattskylduga inntøkan hjá tí sjálvstøðuga vinnurekandi seinastu 12 mánaðirnar fyri 1. juli 2020 verið lægri enn 2.307,60 kr. í miðal um vikuna, verður stuðulin sama upphædd sum miðal vikulønin. Hevur tann skattskylduga inntøkan hjá tí sjálvstøðuga vinnurekandi t.d. verið 2.000 kr. í miðal um vikuna seinasta 12 mánaðar tíðarskeiðið fyri 1. juli 2020, og virksemið hjá viðkomandi minkar við 100%, verður stuðulin 2.000 kr. um vikuna.

Minkar virksemið hjá viðkomandi 50%, so verður stuðulin 1.000 kr. um vikuna. Minkar virksemið hjá viðkomandi 75%, verður stuðulin 1.500 kr. o.s.fr.

Sambært § 9, stk. 1, 1. pkt. er stuðulin í mesta lagi 2.307.60 kr. um vikuna. Hóast skattskylduga inntøkan hjá tí sjálvstøðuga vinnurekandi fólkapensjonistinum er hægri enn hetta, t.d. 3000 kr. um vikuna, kann viðkomandi sostatt ikki fáa meira enn 2.307,60 kr. í stuðli um vikuna. Stuðulin kann tí í ávísum førum vera minni enn inntøkumissurin, sum tann sjálvstøðugi vinnurekandi hevur havt.

Um inntøkan hjá tí sjálvstøðuga vinnurekandi er 3.000 kr. um vikuna, men virksemið hjá viðkomandi bara minkar 50%, verður stuðulin (2.307,60*0,5) 1.153,80 kr. um vikuna.

Skattskylduga inntøkan hjá tí sjálvstøðuga vinnurekandi sambært § 9, stk. 1 fevnir ikki um sosiala pensjón og arbeiðsmarknaðareftirløn, sbr. § 20, stk. 1, nr. 1 og 2 í almannapensjónslógini.

Endamálið við § 9, stk. 2 er at tryggja, at tað ikki ber til hjá persóni, sum bæði hevur rætt til stuðul sum sjálvstøðugur vinnurekandi og rætt til lønaríkoyti sum løntakari, at fáa meira enn 2.307,60 kr. tilsamans í stuðli og lønaríkoyti um vikuna.

Greinin skal skiljast og umsitast á sama hátt sum § 4 í kunngerð nr. 27 frá 23. mars 2020 um rætt til stuðul til sjálvstøðug vinnurekandi í sambandi við COVID-19 og § 12 a, stk. 2-3 í løgtingslóg nr. 113 frá 13. juni 1997 um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 43 frá 7. apríl 2020.

Til § 10
§ 10, stk. 1 ásetir, hvussu leingi tryggingin er galdandi.

Tryggingin er bara galdandi so leingi, sum henda løgtingslóg er í gildi. Tá løgtingslógin fer úr gildi, er tryggingin tískil ikki galdandi longur.

Harafturat er tryggingin bara galdandi í eitt ár í senn. Um løgtingslógin enn er galdandi eitt ár aftaná, at tryggingartakari hevur teknað tryggingina, er tískil neyðugt hjá tryggingartakara at endurnýggja tryggingina og rinda nýtt tryggingargjald, um viðkomandi framvegis vil vera fevndur av tryggingini.

Stk. 2 ásetir, at tryggingin hjá sjálvstøðugum vinnurekandi, sum hevur goldið og teknað trygging sambært tágaldandi løgtingslóg nr. 44 frá 7. apríl 2020, sum broytt við løgtingslóg nr. 102 frá 25. juni 2020, er galdandi í eitt ár frá tí degi, at tryggingin varð teknað sambært tágaldandi løgtingslóg. Tryggingin er tó bara galdandi so leingi, henda løgtingslóg er í gildi.

Greinin skal skiljast og umsitast á sama hátt sum § 5 í kunngerð nr. 27 frá 23. mars 2020 um rætt til stuðul til sjálvstøðug vinnurekandi í sambandi við COVID-19.

Til § 11
§ 11 ásetir eina skyldu hjá tryggingartakaranum at boða Arbeiðsloysisskipanini frá øllum broytingum í sínum viðurskiftum, sum kunnu hava týdning fyri tryggingina.

Eitt nú skal tryggingartakararin beinanvegin boða Arbeiðsloysisskipanini frá, um hann ikki longur lýkur treytirnar fyri at fáa stuðul eftir hesi løgtingslóg.

Greinin skal skiljast og umsitast á sama hátt sum § 6 í kunngerð nr. 27 frá 23. mars 2020 um rætt til stuðul til sjálvstøðug vinnurekandi í sambandi við COVID-19.

Til § 12
§ 12 er ein áseting um umsiting og eftirlit.

Av tí, at talan er um eina skipan, ið verður umsitin av Arbeiðsloysisskipanini, hevur Arbeiðsloysisskipanin heimild at útvega sær allar viðkomandi upplýsingar frá TAKS og øðrum viðkomandi myndugleikum, t.d. Almannaverkinum.

Greinin leggur seg upp at § 27 í løgtingslóg nr. 113 frá 13. juni 1997 um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 25 frá 18. mars 2020. Víst verður tí til hesa grein og serligu viðmerkingarnar til greinina.

Til § 13
§ 13 ásetir, at upphæddir, ið eru útgoldnar av óréttum, kunnu verða kravdar afturgoldnar.

Greinin vísir til § 28 í løgtingslóg nr. 113 frá 13. juni 1997 um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 25 frá 18. mars 2020. Víst verður tí til hesa grein og serligu viðmerkingarnar til greinina.

Til § 14
§ 14 er ein revsiheimild, sum leggur seg upp at § 29 í løgtingslóg nr. 113 frá 13. juni 1997 um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 25 frá 18. mars 2020. Víst verður tí til hesa grein og serligu viðmerkingarnar til hana.

Brot á ásetingarnar í hesum lógaruppskoti kunnu tó bara verða revsað við sekt, sbr. § 14, stk. 1.

Til § 15

§ 15 ásetir kærumyndugleikan, sum er lagdur til kærunevndina hjá Arbeiðsloysisskipanini.

Greinin vísir til § 26 í løgtingslóg nr. 113 frá 13. juni 1997 um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 25 frá 18. mars 2020. Víst verður tí til hesa grein og serligu viðmerkingarnar til greinina.

Til § 16
§ 16 í lógaruppskotinum tilskilar, at samlaðu útreiðslurnar fyri lønarískoyti og stuðul, og umsiting av hesum, verða endurrindaðar Arbeiðsloysisskipanini av landinum.

Útreiðslurnar verða endurrindaðar Arbeiðsloysisskipanini, væntandi seinni í ár, tá løgtingslógin er farin úr gildi.

Til § 17
§ 17, stk. 1 ásetir, at løgtingslógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, men fær virknað frá 1. juli 2020. Sólseturásetingin ásetir, at løgtingslógin fer úr gildi 31. august 2020. Hetta verður gjørt, tí at vónandi fara serligu umstøðurnar orsakað av COVID-19 at koma í rættlag aftur innan hesa tíð, soleiðis at brúk ikki verður fyri serligu stuðulsskipanini longur.

Stk. 2 ásetir, at umsóknir, sum ikki eru komnar inn, ella sum ikki eru liðugt viðgjørdar, áðrenn lógin fór úr gildi, verða viðgjørdar eftir reglunum í hesi løgtingslóg. Tó er tað ein treyt, at umsóknin er Arbeiðsloysisskipanini í hendi innan 3 mánaðir eftir, at lógin fór úr gildi. Umsóknir, sum koma inn eftir hetta, verða ikki viðgjørdar.

Almannamálaráðið, 13. august 2020

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur
landsstýrismaður

/ Eyðun Mohr Hansen